# Roknskapargreining av flakavirkjum 2008 til 2012

© **JANUAR,** Løggilt grannskoðanarvirki
Tað er ikki loyvt at avrita tilfarið uttan loyvi frá JANUAR

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur og niðurstøða ... 2**
Inngangur ... 2
Niðurstøða ... 2
**Rakstur 2008 til 2012 ... 4**
Rakstur í mun til ráfiskanøgd ... 5
Rakstur í mun til framleiðsluvirði ... 5
Útflutningur av óvirkaðum fiski ... 6
Lønarhagtøl ... 6
**Greining av aktivum ... 7**
Aktiv í alt ... 7
Íløgur og avskrivingar ... 8
Umsetningsferðir ... 8
**Greining av passivum ... 9**
**Lyklatøl ... 10**
Rentabilitetur v.m. ... 10
Gjaldføri ... 10
Onnur hagtøl ... 10

# Inngangur og niðurstøða

## Inngangur

Roknskapargreiningin umfatar 7 feløg í 2012. Greiningin er grundað á almennu ársroknskapirnar fyri 2008 til 2012 umframt á eyka upplýsingar frá teimum feløgum, sum í sínum ársroknskapi ikki upplýsa ráfiskanøgd, nettosølu og ráfiskakostnað.

Tey luttakandi feløgini eru:

**Býti-% Ráfiskanøgd:**

| | **Ráfiskur í 2012 (%)** |
|---|---:|
| Kósin | 25,1% |
| Faroe Origin | 17,4% |
| TG Seafood | 14,4% |
| Vaðhorn | 14,2% |
| Delta | 11,1% |
| Fiskavirkið | 10,3% |
| Sandoy | 7,6% |
| **Tilsamans** | **100,0%** |

Roknskapirnir hjá teimum luttakandi feløgunum eru uppsettir ymiskt, og kontur eru bólkaðar ymiskt, eins og feløgini neyvan skráseta sínar bókingar heilt eins. Hetta kann viðføra, at munir kunnu vera í samanlagda roknskapinum fyri øll feløgini, men hetta hevur helst bert lítlan týdning.

Har dótturfeløg eru, sum eisini reka flakavirki, ið eru við í greiningini, er úrslitið hjá dótturfeløgum "eliminerað" í rakstrinum hjá móðurfelagnum, og somuleiðis eru kapitalpartarnir "elimineraðir" burtur úr fíggjarstøðuni hjá móðurfelagnum. Harvið kemur úrslit og eginpeningur hjá dótturfeløgum bert fyri ta einu ferðina í roknskapargreiningini.

Sum talvan niðanfyri vísir, umboða hesi 7 feløgini 69,2% av fiskaframleiðsluni í Føroyum í 2012.

**Ráfiskanøgdir**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| Ráfiskanøgd (t) - luttakandi feløg | 62.083 | 58.682 | 57.482 | 41.468 | 43.753 |
| Ráfiskanøgd í alt (t), framleidd á før. virkjum *) | 71.215 | 71.827 | 70.454 | 59.855 | 63.266 |
| | | | | | |
| Ráfiskanøgd (%) - luttakandi feløg | 87,2% | 81,7% | 81,6% | 69,3% | 69,2% |
| Ráfiskanøgd í alt (%), framleidd á før. virkjum *) | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% |

**) Kelda: Heimasíða hjá Hagstovu Føroya og upplýsingar frá Ráfiskakeyparafelagnum viðv. feskfiskaveiðu*

## Niðurstøða

Vit hava lagt dent á, at roknskapargreiningin skal geva lesarunum møguleika at gera sínar egnu niðurstøður, og tí hava vit ikki eina eintýdda niðurstøðu um gongdina. Vit kunnu tó staðfesta, at raksturin hjá virkjunum samanlagt hevur givið hall øll árini, undantikið 2011. Úrslitini hava verið skiftandi frá 2008 til 2012.

Greiningarnar hjá JANUAR frá undanfarnum árum vísa, at árini 1996 og 1997 vóru vánalig, og at síðani komu fýra góð ár frá 1998 til 2002. Kanningin fyri tíðarskeiðið 2006 til 2010, vísti, at árini 2007 og 2008 royndust serstakliga illa. Hallið hesi árini var ávikavist 104 og 59 mió. kr. Í 2009 er hallið 9 mió. kr., og í 2010 er hallið 37 mió. kr.

Skiparakstur tyngdi virkini nógv í 2007 til 2010. Orsøkin til, at hallið var minni í 2008, var, at raksturin av skipum ikki tyngdi virkini í sama mun, sum árið fyri, tó at 2008 eisini var eitt vánaligt ár. Sama ger seg galdandi fyri árini 2009 og 2010. Um sæð verður burtur frá skiparakstri í 2009 høvdu flakavirkini samanlagt givið avlop.

Gjaldføristrupulleikar hava tarnað rakstrinum á summum virkjum. Hesir trupulleikar eru íkomnir av stórum hallum og stórum íløgum, og hava virki dúvað upp á vælvilja frá fíggjarstovnum.

Kósin var endurreist í 2009, og fyrra hálvár 2011 varð stórur partur av Faroe Seafood samtakinum endurreistur við nýggjum eigarum. Árið 2011 royndist væl, hóast tann arbeidda nøgdin var lág. 2012 hevur aftur víst hall á tkr. -2.411. Gongdin hjá teimum enkultu virkjunum hevur tó verið misjøvn.

Tórshavn, tann 20. september 2013

**JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| Fróði Sivertsen | Christina á Bøgarði |
| statsaut. revisor | grannskoðari |

# Rakstur 2008 til 2012

**Rakstur (t.kr)**

| | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | ***Vøkstur 5 ár*** | ***Vøkstur 1 ár*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av virkjum | 9 | 8 | 7 | 7 | 7 | | |
| Ráfiskanøgd (tons) | 62.083 | 58.682 | 57.482 | 41.468 | 43.753 | *-29,5%* | *5,5%* |
| | | | | | | | |
| Framleiðsluvirði | 1.243.954 | 1.101.445 | 996.286 | 861.836 | 891.960 | *-28,3%* | *3,5%* |
| Broyting í goymslu fl. til framleiðsluv. | -16.996 | -7.749 | -11.598 | -6.253 | -2.475 | *85,4%* | *60,4%* |
| Útreiðslur fyri rávørur og hjálpitilfar | -829.189 | -712.104 | -653.715 | -618.796 | -636.338 | *23,3%* | *-2,8%* |
| | | | | | | | |
| **Virðisøking** | **397.769** | **381.592** | **330.973** | **236.787** | **253.147** | ***-36,4%*** | ***6,9%*** |
| | | | | | | | |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 430 | 394 | 86 | 408 | 1.535 | *257,0%* | *276,2%* |
| | | | | | | | |
| **Bruttovinningur** | **398.199** | **381.986** | **331.059** | **237.195** | **254.682** | ***-36,0%*** | ***7,4%*** |
| | | | | | | | |
| Starvsfólkakostnaður | -244.269 | -230.744 | -200.323 | -138.581 | -156.934 | *35,8%* | *-13,2%* |
| Annar rakstrarkostnaður | -111.716 | -100.915 | -105.578 | -64.222 | -88.935 | *20,4%* | *-38,5%* |
| | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar** | **42.214** | **50.327** | **25.158** | **34.392** | **8.813** | ***-79,1%*** | ***-74,4%*** |
| | | | | | | | |
| Avskrivingar | -25.028 | -20.347 | -19.530 | -14.436 | -10.291 | *58,9%* | *28,7%* |
| Úrslit dótturfelag/atknýtt felag | -43.673 | -21.676 | -21.382 | 988 | 9.254 | *121,2%* | *-836,6%* |
| Rentuinntøkur | 542 | 838 | 765 | 6.250 | 951 | *75,5%* | *-84,8%* |
| Rentuútreiðslur | -26.920 | -25.554 | -20.376 | -11.868 | -11.188 | *58,4%* | *5,7%* |
| | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn óvanligt er tikið við** | **-52.865** | **-16.412** | **-35.365** | **15.326** | **-2.461** | ***95,3%*** | ***116,1%*** |
| | | | | | | | |
| Óvanligar inntøkur | 609 | 18.800 | 0 | 0 | 0 | ***-100,0%*** | - |
| Óvanligar útreiðslur | -3.385 | -10.319 | 0 | 0 | 0 | ***100,0%*** | - |
| | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn skattur er drigin frá** | **-55.641** | **-7.931** | **-35.365** | **15.326** | **-2.461** | ***95,6%*** | ***116,1%*** |
| | | | | | | | |
| Skattur av ársúrsliti | -3.117 | -897 | -1.622 | 290 | 50 | *101,6%* | *82,8%* |
| | | | | | | | |
| **Ársúrslit** | **-58.758** | **-8.828** | **-36.987** | **15.616** | **-2.411** | ***95,9%*** | ***115,4%*** |

Samanløgdu rakstrartølini vísa, at raksturin hjá virkjunum samanlagt hevur givið hall øll árini, undantikið 2011. Árini 2008 -2010 vórðu merkt av, at raksturin av skipum hevði stóra negativa ávirkan á raksturin, um hetta ikki hevði verið støðan, vildi 2009 havt givið samlað yvirskot. Í 2011 og 2012 er raksturin ikki ávirkaður negativt av hesi orsøk, í 2012 er talan enntá um munandi inntøkur av kapitalpørtum.

Tølini vísa, at ráfiskanøgdin, við undantakið av 2012, er fallandi í øllum tíðarskeiðnum,.

Framleiðsluvirðið er lækkað við 28,3% í tíðarskeiðnum, somuleiðis eru rávøruútreiðslur og hjálpitilfar lækkað við 23,3%. Bruttovinningurin er fallin við 36%.

Starvsfólkakostnaðurin hevur verið fallandi, og er hesi 5 árini lækkaður við 35,8%. Posturin "Annar rakstrarkostnaður", sum umfatar eitt nú streymgjald, oljunýtslu, viðlíkahald, reingerð, flutningsgjøld, skrivstovuhald, leigu o.m.a., hevur somuleiðis sveiggjað nakað, og er 20,4% lægri í 2012 samanborið við 2008.

Úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar er fallin við 79,1% í tíðarskeiðnum.

Avskrivingar eru lækkaðar við 58,9% tíðarskeiðnum frá 2008 til 2012, meðan rentuútreiðslurnar eru lækkaðar við 58,4% í sama tíðarskeið.

Ársúrslitið hevur verið negativt øll árini, undantikið 2011.

## Rakstur í mun til ráfiskanøgd

Talvan niðanfyri vísir gongdina í kr. pr. kg. rávøru.

**Rakstur í mun til ráfiskanøgd**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur* | Í miðal 08-12 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1) Framleiðsluvirði (Søla + goymslubr. | 19,76 | 18,64 | 17,13 | 20,63 | 20,33 | *2,9%* | 19,17 |
| 2) Rávøra og hjálpitilfar | -13,36 | -12,13 | -11,37 | -14,92 | -14,54 | *8,9%* | -13,10 |
| 3) Virðisøking (1-2) | 6,41 | 6,50 | 5,76 | 5,71 | 5,79 | *-9,7%* | 6,07 |
| 4) Lønir | -3,93 | -3,93 | -3,48 | -3,34 | -3,59 | *-8,8%* | -3,68 |
| 5) Úrslit | -0,95 | -0,15 | -0,64 | 0,38 | -0,06 | *94,2%* | -0,35 |

Talvan vísir, at framleiðsluvirðið pr. kg og ráfiskakostnaðurin er hækkað frá 2008 til 2012. Hækkingin í rávøru og hjálpitilfari er størri enn økingin í framleiðsluvirði. Tískil er virðisøking pr. kg lækkað í tíðarskeiðnum.

Lønarúrreiðslur pr. kg eru lækkaðar við 8,8% frá 2008 til 2012.

Úrslitið í kr. pr. kg rávøru er, við undantakið av 2011, støðugt negativt.

## Rakstur í mun til framleiðsluvirði

Í talvuni niðanfyri er framleiðsluvirðið tey 5 árini 2008 til 2012 sett til 100%, og so eru aðrir postar settir í mun til hetta.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirði (Søla + goymslubr.) | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% |
| Rávøra og hjálpitilfar | -67,6% | -65,1% | -66,4% | -72,3% | -71,5% |
| Virðisøking | 32,4% | 34,9% | 33,6% | 27,7% | 28,5% |
| Lønir | -19,9% | -21,1% | -20,3% | -16,2% | -17,6% |
| Rentur og avskrivingar | -4,2% | -4,1% | -4,0% | -2,3% | -2,3% |
| Annað | -13,1% | -10,5% | -13,0% | -7,3% | -8,8% |
| Úrslit | -4,8% | -0,8% | -3,8% | 1,8% | -0,3% |

Henda lýsing vísir, at ráfiskakostnaðurin hevur verið millum 65,1% og 72,3% av framleiðsluvirðinum alt tíðarskeiðið. Lønir hava verið millum 16,2% og 21,1% av framleiðsluvirðinum í tíðarskeiðnum. Rentur og avskrivingar hava verið nøkulunda støðug frá 2008 til 2010, og lækka síðani til 2,3% í 2011 og 2012. Aðrir kostnaðir hava sveiggjað eitt sindur í tíðarskeiðnum og liggja í intervallinum 7,3% til 13,1%.

Úrslitið (yvirskotsgradin) liggur millum -4,8% í 2008 og 1,8% í 2011.

**Útflutningur av óvirkaðum fiski**

Sambært Ráfiskakeyparafelagnum hevur gongdin í útflutningi av feskum heilum fiski verið henda:

| Tons | 2008 | 2009 | *2010* | *2011* | *2012* | *Vøkstur 4 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 1.736 | 2.184 | 3.884 | 2.432 | 1.415 | -18,5% | *-41,8%* |
| Hýsa | 4.285 | 3.737 | 4.008 | 3.130 | 2.086 | -51,3% | *-33,4%* |
| Upsi | 1.574 | 3.153 | 1.441 | 1.126 | 396 | -74,8% | *-64,8%* |
| Annað | 15.818 | 17.184 | 25.619 | 16.540 | 18.866 | 19,3% | *14,1%* |
| Í alt | 23.413 | 26.258 | 34.952 | 23.228 | 22.763 | -2,8% | *-2,0%* |

Útflutningurin av feskum fiski hækkaði frá 2008 til 2010, men lækkar aftur í 2011. Frá 2011 til 2012 hevur verið ein øking á 14,1%.

**Lønarhagtøl**

Á talvuni niðanfyri eru nøkur hagtøl fyri ársverk og lønir v.m.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ársverk | 1.072 | 993 | 889 | 587 | 638 | *-40,5%* | *8,7%* |
| Miðal ársløn (tkr.) | 228 | 232 | 225 | 236 | 246 | *8,0%* | *4,2%* |
| Ráfiskur (tons) / ársverk | 58 | 59 | 65 | 71 | 69 | *18,4%* | *-2,9%* |
| Úrslit áðr. óvanligt / ársverk | -49 | -17 | -40 | 26 | -4 | *92,2%* | *114,8%* |

Talvan vísir, at talið av ársverkum hevur verið støðugt minkandi fram til 2011, men hækkar við 8,7% frá 2011 til 2012. Ráfiskur pr. ársverk hevur við undantaki av 2012 verið hækkandi. Úrslit áðrenn óvanligt pr. ársverk hevur verið skiftandi, og er -4 í 2012.

# Greining av aktivum

## Aktiv í alt

Talvan niðanfyri vísir samlaðu aktivini hjá virkjunum árini 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| Aktiv | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Innrættingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Grundøki og bygningar | 106.333 | 115.716 | 112.540 | 91.502 | 82.447 | *-22,5%* | *-9,9%* |
| Tøkniogn og maskinur | 80.306 | 68.140 | 66.652 | 33.629 | 33.059 | *-58,8%* | *-1,7%* |
| Rakstrartól og innbúgv | 13.009 | 4.673 | 6.896 | 17.189 | 16.683 | *28,2%* | *-2,9%* |
| **Materiel støðisogn í alt** | **199.648** | **188.529** | **186.088** | **142.320** | **132.189** | ***-33,8%*** | ***-7,1%*** |
| | | | | | | | |
| Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum | 7.755 | 8.574 | 8.000 | 1.522 | 11.796 | *52,1%* | *675,0%* |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 1.639 | 1.639 | 1.640 | 2.000 | 0 | *-100,0%* | *-100,0%* |
| Onnur virðisbrøv | 3.507 | 7.074 | 7.433 | 1.953 | 16.283 | *364,3%* | *733,7%* |
| Onnur áogn | 300 | 594 | 594 | 1.839 | 2.139 | - | *16,3%* |
| **Fíggjarlig støðisogn í alt** | **15.601** | **20.281** | **20.067** | **7.314** | **30.218** | ***93,7%*** | ***313,2%*** |
| | | | | | | | |
| **STØÐISOGN Í ALT** | **215.249** | **208.810** | **206.155** | **149.634** | **162.407** | ***-24,5%*** | ***8,5%*** |
| | | | | | | | |
| Vørugoymsla | 127.010 | 100.331 | 88.339 | 70.755 | 75.116 | *-40,9%* | *6,2%* |
| Vøru- og tænastuáogn | 163.424 | 123.941 | 155.423 | 73.468 | 89.647 | *-45,1%* | *22,0%* |
| Áogn í atknýttum felag | 52.235 | 71.166 | 21.210 | 10.160 | 20.674 | *-60,4%* | *103,5%* |
| Onnur áogn | 9.275 | 8.618 | 3.549 | 6.784 | 8.759 | *-5,6%* | *29,1%* |
| **Áogn í alt** | **351.944** | **304.056** | **270.837** | **164.627** | **196.982** | ***-44,0%*** | ***19,7%*** |
| | | | | | | | |
| Tøkur peningur | 1.024 | 1.945 | 1.794 | 9.344 | 8.846 | *763,9%* | *-5,3%* |
| | | | | | | | |
| **OGN Í UMFERÐ Í ALT** | **352.968** | **306.001** | **272.631** | **173.971** | **205.828** | ***-41,7%*** | ***18,3%*** |
| | | | | | | | |
| **AKTIV Í ALT** | **568.217** | **514.811** | **478.786** | **323.605** | **368.235** | ***-35,2%*** | ***13,8%*** |

Virðið á materiellari støðisogn lækkar við 33,8% frá 2008 til 2012.

Fíggjarlig støðisogn er nærum tvífalda í tíðarskeiðnum. Serliga frá 2011 til 2012 er fíggjarlig støðisogn hækkað.

Goymslurnar og skuldarar hava verið fallandi í tíðarskeiðnum. Virðið á vørugoymslunum er lækkað við 40,9% frá 2008 til 2012. Skuldarar er samlað lækkað við 45,1% frá 2008 til 2012.

Samlaði javnin er minkaður við 35,2% í tíðarskeiðnum, havast skal tó í huga, at talið av virkjum er minkað frá 9 til 7 virkir í tíðarskeiðnum.

**Íløgur og avskrivingar**

Talvan niðanfyri lýsir gongdina í gjørdum íløgum í støðisogn. Somuleiðis sæst gongdin í avskrivingum.

| Tkr. | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Íløgur í árinum | 15.117 | 8.818 | 19.317 | 6.455 | 3.964 | *-73,8%* | *-38,6%* |
| | | | | | | | |
| Innrættingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | - | - |
| Grundøki og bygningar | 106.333 | 115.716 | 112.540 | 91.502 | 82.447 | *-22,5%* | *-9,9%* |
| Rakstrartól | 93.315 | 72.813 | 73.548 | 50.818 | 49.742 | *-46,7%* | *-2,1%* |
| Materiel støðisogn í alt | 199.648 | 188.529 | 186.088 | 142.320 | 132.189 | *-33,8%* | *-7,1%* |
| | | | | | | | |
| Avskrivingar | 25.028 | 20.347 | 19.530 | 14.436 | 10.291 | *-58,9%* | *-28,7%* |
| | | | | | | | |
| Ár eftir at avskriva | 8,0 | 9,3 | 9,5 | 9,9 | 12,8 | *61,0%* | *30,3%* |

Talvan vísir, at íløgurnar lækka frá 2008 til 2009, men hækkað nakað aftur í 2010, fyri síðan at lækka í 2011 og 2012.

Avskrivingarnar eru lækkaðar 58,9% hesi 5 árini.

Niðasta linja í talvuni ber heitið "Ár eftir at avskriva" og er roknað út sum "Materiell støðisogn í alt" / "Avskrivingar". Hetta talið hevur verið støðugt hækkandi í tíðarskeiðnum.

**Umsetningsferðir**

Á talvuni niðanfyri eru nøkur lyklatøl, ið viðvíkja aktivum.

| Dagar | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningsferð goymslur (dagar) | 36,8 | 32,8 | 31,9 | 29,6 | 30,3 | *-17,5%* | *2,6%* |
| Umsetningsferð skuldarar (dagar) | 47,3 | 40,5 | 56,2 | 30,7 | 36,2 | *-23,5%* | *17,9%* |
| | | | | | | | |
| Dagar frá framleiðslu til inngjald | 84,1 | 73,3 | 88,1 | 60,2 | 66,5 | *-20,9%* | *10,4%* |

Gongdin er, at umsetningsferðin á goymslum og skuldarum økist - færri goymslu- og skuldardagar= hægri umsetningsferð. Hetta hevur við sær, at dagatalið frá framleiðslu til inngjald hevur verið fallandi í tíðarskeiðnum. Frá 2008 til 2012 er talið fallið frá 84,1 til 66,5 dagar, ella 20,9%.

## Greining av passivum

**Passiv í alt**

Talvan niðanfyri vísir gongdina í passivum árini 2008 til 2012 (kr. 1.000).

| Passiv | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | *Vøkstur 5 ár* | *Vøkstur 1 ár* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 77.510 | 74.447 | 68.449 | 61.073 | 70.044 | *-9,6%* | *14,7%* |
| Tiltaksgrunnur o.a. | 2.450 | 9.856 | 10.156 | 23.341 | 28.937 | - | *24,0%* |
| Fluttur vinningur | -36.610 | -27.314 | -50.399 | -46.384 | -82.617 | - | *-78,1%* |
| **EGINOGN Í ALT** | **43.350** | **56.989** | **28.206** | **38.030** | **16.364** | ***-62,3%*** | ***-57,0%*** |
| | | | | | | | |
| Útsettur skattur | 2.915 | 4.729 | 5.383 | 5.615 | 4.992 | *71,3%* | *-11,1%* |
| **AVSETINGAR Í ALT** | **2.915** | **4.729** | **5.383** | **5.615** | **4.992** | ***71,3%*** | ***-11,1%*** |
| | | | | | | | |
| **Langfreistað skuld** | **197.256** | **187.580** | **180.742** | **140.618** | **160.109** | ***-18,8%*** | ***13,9%*** |
| | | | | | | | |
| Avdráttir at gjalda næsta ár | 7.520 | 21.218 | 23.394 | 32.150 | 30.773 | *309,2%* | *-4,3%* |
| Rakstrarkredittir v.m. | 198.717 | 166.439 | 152.794 | 31.749 | 50.970 | *-74,4%* | *60,5%* |
| Skuld til atknýtt felag/dótturfelag | 21.171 | 24.953 | 32.272 | 3.125 | 3.457 | *-83,7%* | *10,6%* |
| Partafelagsskattur | 6 | 1.837 | 681 | 2.186 | 309 | *5050,0%* | *-85,9%* |
| Vøru- og tænastuskuld | 61.078 | 41.290 | 44.697 | 55.188 | 56.284 | *-7,8%* | *2,0%* |
| Onnur skuld | 36.204 | 9.776 | 10.617 | 14.944 | 44.977 | *24,2%* | *201,0%* |
| **Stuttfreistað skuld í alt** | **324.696** | **265.513** | **264.455** | **139.342** | **186.770** | ***-42,5%*** | ***34,0%*** |
| | | | | | | | |
| **SKULD Í ALT** | **521.952** | **453.093** | **445.197** | **279.960** | **346.879** | ***-33,5%*** | ***23,9%*** |
| | | | | | | | |
| **PASSIV Í ALT** | **568.217** | **514.811** | **478.786** | **323.605** | **368.235** | ***-35,2%*** | ***13,8%*** |

Tølini viðvíkjandi eginognini vísa eina afturgongd á 62,3%. Umskipan í 2009 er orsøkin til, at eginpeningurin hækkar frá 2008 til 2009 hóast hall í 2009. Eginpeningur lækkar aftur í 2010 orsakað av vánaligum rakstri hjá virkjunum samanlagt. Í 2011 henda aftur nakrar umskipanir, ið eru við til, at eginognin hækkar, positiva úrslitið í 2011 ávirkaði eisini. Í 2012 er eginognin aftur fallin.

Langfreistaða skuldin er lækkað við 18,8% hesi 5 árini, meðan tann stuttfreistaða skuldin er lækkað við 42,5%.

# Lyklatøl

## Rentabilitetur v.m.

Talvan niðanfyri vísir nøkur lyklatøl, ið m.a. hava við rentabilitet at gera.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast (Afkastningsgrad) | 3,0% | 5,8% | 1,2% | 6,2% | -0,4% |
| Rakstraravkast (Overskudsgrad) | -4,7% | -0,8% | -3,7% | 1,8% | -0,3% |
| Renting av eginogn | -135,5% | -15,5% | -131,1% | 41,1% | -14,7% |
| Soliditetsstig | 7,6% | 11,1% | 5,9% | 11,8% | 4,4% |
| Miðal renting av fremmandari skuld | 6,1% | 6,6% | 5,5% | 5,4% | 3,9% |

Talvan vísir, at ognaravkastið, ið er "úrslit av primerum rakstri" í mun til javnan hevur verið skiftandi og er í 2012 á einum væl lægri støði enn undanfarin ár. "Úrslit av primerum rakstri" er úrslit áðrenn rentur og úrslit frá dótturfeløgum/assosieraðum feløgum.

Rakstraravkastið, ið er "nettoavlop" í mun til "nettosølu", t.v.s. hvussu stórur partur av umsetninginum er eftir á niðastu linju, hevur verið svingandi, men negativt nærum øll árini.

Rentingin av fremmandari skuld er roknað sum rentuútreiðslur í mun til rentuberandi skuld (veðskuld, rakstrarkredittir og onnur skuld).

## Gjaldføri

Talvan niðanfyri vísir gjaldførisstig hesi 5 árini.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Gjaldførisstig 1 | 0,70 | 0,77 | 0,70 | 0,74 | 0,70 |
| Gjaldførisstig 2 | 1,09 | 1,15 | 1,03 | 1,25 | 1,10 |

Gjaldførisstig 1 er roknað soleiðis: "Ogn í umferð (uttan goymslur)" / "Stuttfreistað skuld". Gjaldførisstig 2 er roknað soleiðis: "Ogn í umferð" / "Stuttfreistað skuld". Sum tað framgongur, eru gjaldførisstigini svingandi, men lág í tíðarskeiðnum.

## Onnur hagtøl

Niðanfyri er ein talva við ymsum upplýsingum um virkini.

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av virkjum, ið hava avlop | 5 | 5 | 6 | 6 | 4 |
| Tal av virkjum, ið hava hall | 4 | 3 | 1 | 1 | 3 |

Í 2012 høvdu 4 virki avlop og 3 høvdu hall.